**At veita starvsfólkum heilsuhjálp**

Ein týdningarmikil uppgáva hjá leiðarum, er at tryggja góðar arbeiðsumstøður og trivnað millum starvsfólkini. Trupulleikarnar kunnu vera ymiskir, har nakrir kunnu stava beinleiðis frá arbeiðsplássinum, og í øðrum førum, kann trupulleikin stava frá heiminum, ella ein samanrenning av báðum.

Í leiðreglum landsins um arbeiðsumhvørvispolitikk er ásett, at:
"Arbeiðsumhvørvið, ið fevnir um kringumstøðurnar á arbeiðsplássinum- bæði likamligu og sálarligu - skal vera so trygt og heilsugott, sum til ber.
Endamálið er at skapa trygd, trivnað og menning á arbeiðsplássinum og stimbra áhugan fyri arbeiðsuppgávunum, m.a. fyri at leiðsla og starvsfólk á betri og munadyggari hátt verða før fyri at røkja tær uppgávur, sum áliggja teimum."

Uppgávan hjá okkum er sostatt, at virka fyri nøktandi kørmum til starvsfólkini, soleiðis at trivnaðurin og virkisføri teirra er so góður sum gjørligt. Í hesum sambandi er tað umráðandi at næsti fyrisetti, er varugur við tey eyðkenni, sum kunnu benda á, at starvsfólkið ikki hevur tað gott, og at næsti fyrisetti, í samráði við rektarin, fær neyðugar heimildir til at bøta uppá viðurskiftini.

Øll mál og viðurskiftir eru ikki eins, tískil má ein serstøk  meting gerast í hvørjum einstøkum føri.

Næsti fyrisetti hevur, í samráði við rektaran, heimild til at stuðla við heilsubøtandi átøkum við í mesta lagi 5.000 kr..

Samtykt á leiðslufundi tann 10. februar 2015